# Kærleikssøga aldarinnar

© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Märta Tikkanen

# Kærleikssøga aldarinnar

Úrval úr savninum

Týtt hevur Laura Joensen

Føroya Skúlabókagrunnur

Rúsdrekka- og Narkotikaráðið

© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Märta Tikkanen
Kærleikssøga aldarinnar – úrval
Týtt: Laura Joensen
Skrivað og lagt til rættis arbeiðstilfar:
Turið Sigurðardóttir og Bergljót av Skarði
© 1998, Føroya Skúlabókagrunnur
© 2006, Føroya Skúlabókagrunnur, óbroytt teldutøk útgáva
Kápa, uppseting og umbróting: Gramar
Prent: Estra Prent
Útgáva: Føroya Skúlabókagrunnur og
Rúsdrekka- og Narkotikaráðið
Tórshavn 1998

ISBN: 99918-0-201-0

© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

# Innihaldsyvirlit

Formæli 7

Märta Tikkanen 9

Kærleikssøga aldarinnar 12

Úrval úr savninum 17

Yrkingar úr sjónbandsfilminum 57

Evni at arbeiða við 73

© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

# Formæli

Hesin bóklingur er eitt úrval úr yrkingasavninum *Kærleikssøgu aldarinnar* eftir Märtu Tikkanen. Yrkingasavnið viðger trupulleikarnar í eini familju, har maðurin er rúsdrekkamisnýtari. Yrkingasavnið *Kærleikssøga aldarinnar* er sjálvsævisøguligt og viðger hjúnalag Märtu Tikkanens við listamannin Henrik Tikkanen.

Sjáldan eru kenslurnar hjá konu ein misnýtara so bersøgið og beinrakið lýstar sum í hesum savni. Hvussu meint familjan verður rakt av misnýtsluni, verður kensluborið og ærliga viðgjørt.

Tilfarið kann nýtast í bókmentaundirvísingini í føroyskum í elstu flokkum fólkaskúlans og í miðnámsskúlunum. Í miðnámsskúlunum kann tað - eisini saman við sjónbandi við sama heiti - nýtast sum høvuðsverk, og lýkur tað krøvini, sum kunngerðirnar í føroyskum í miðnámsskúlunum áseta.

Í bóklinginum eru eisini yrkingar, sum eru brúktar í sjónbandinum við sama navni. Filmurin hevur føroyska talu og er tikin upp í Føroyum. Sjónbandið er ein filmsútgáva av framførslu, sum Laura Joensen hevði við yrkingum Märtu Tikkanens í seinnu helvt av 80-árunum. Sjónbandið fæst til



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

láns á Landsmiðstøðini Fyri Undirvísingaramboð. Bóklingurin er góður stuðul undir sjónbandsfilminum.

Skaldskapur Märtu Tikkanens verður í stuttum viðgjørdur. Yrkingarnar úr sjónbandsfilminum eru í savninum, og arbeiðsuppgávur til filmin og yrkingarnar eru aftast í bóklinginum.

Bóklingurin er vorðin til í samstarvi millum Føroya Skúlabókagrunn og Rúsdrekka- og Narkotikaráðið.



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

# Märta Tikkanen

Märta Tikkanen er ein av teimum mest týddu finnlandssvensku rithøvundunum. Hon er fødd í Helsingfors í 1935 og vaks upp í teirri mentaðu borgarastættini. Pápi hennara var professari. Hon hevur universitetsprógv og hevur verið móðurmálslærari, rektari á svenska arbeiðaraháskúlanum í Helsingfors og blaðkvinna.

Märta Tikkanen hevur í nógvum skaldsøgum fingist við støðuna hjá nútíðarkonuni, sum er klovin millum familjulív og krøv um at realisera seg sjálva. Hon viðger kvinnukúgan og erotiskar fløkjur. Høvuðspersónar hennara vilja verja seg fyri at verða dyrkaðar sum ognarlutir mansins, verja sítt einkalív og taka lut í felagsskapum uttan fyri familjurammuna.

Í tveybinda skaldsøguni *Nu imorron* (1970) og *Ingenmansland* (1972) lýsir Märta Tikkanen tørvin hjá kvinnum á innari frígering og stríð og møði hjá teimum heimaarbeiðandi kvinnunum. Í seinna partinum lýsir hon hjúnabandsfløkjurnar, sum stinga seg upp, tá ið familjuábyrgd og politiskt, frígerandi samhugakrav bresta saman.

*Vem bryr sej om Doris Mihajlov* (1974) og *Män kan inte våldtas* (1975) eru feministisk stríðsrit. Tann fyrra er um eina kvinnu, sum er av teimum lítið mentu í samfelagnum, og sum bæði yrkissálarfrøðin og almenningurin eru hjartaleys ímóti. Tann seinna er um neyðtøku sum part av ikki bara



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

kvinnukúganini í samfelagnum, men sum úrslit av mentan, ið viðurkennir og dyrkar yvirgang.

1978 kom *Århundradets kärlekssaga*, ein røð av samanhangandi, navnleysum yrkingum, sum í einum viðbragdi gjørdu Märtu Tikkanen kenda um øll Norðurlond. Hetta var, meðan tann nýggja kvinnurørslan var í hæddini, og í 1979 tilnevndu norðurlendskir kvinnuligir bókmentafrøðingar verk hennara til norðurlendska bókmentavirðisløn. Tilnevningin var ein mótleikur til bókmentavirðisløn Norðurlandaráðs, sum tá ongantíð var veitt kvennhøvundum.

*Mörkret som ger glädjen djup* (1981) er eisini ein røð av yrkingum uttan yvirskrift, øll bókin sum hon er. Eins og yrkingasavnið frammanundan talar henda bókin í fyrsta persóni, ágangandi, húðarleyst og beinleiðis um menniskjanslig samskifti – her er tað mamman, sum av allari megi søkir samband við sín sálarsjúka son; granskar seg sjálva og hann og viðurskiftini, sum hava verið í familjuni.

*Rödluvan* (1986) er sjálvsævisøgulig skaldsøga um eina smágentu og tætta samband hennara við pápa sín.

*Storfångaren* (1989) er ein persónlig frágreiðing um ferð Märtu Tikkanens í Grønlandi, har hon las upp og tosaði um bøkur sínar. Tvær høvuðsfláir eru í bókini: lýsing av, hvussu hon upplivir tað fremmanda landið, og hugsanir, stílaðar sum einatalur til ein mann, hon elskar. Stílurin, neyvur og skrásetandi, minnir um *Århundradets kärlekssaga*.



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

*Arnaia kastad i havet* (1992) byggir á griksku frumsøgnina um Penelopu. Yrkingasavnið er um kvinnuna, sum situr við vevin og bíðar. Mynstrið í vevinum myndar fýra menn hennara: Pápan Ikaros, sum tveitti hana í havið, makan Odysseus, sum fór frá henni og læt hana sita eftir í einsemi, sonin Telemakhos, sum er framtíðin og ampin, og at enda elskaran Amfinomos, sum svaraði henni við tøgn og kenslukulda. Í hesum savni hevur Märta Tikkanen lýst tvørgongdu leiðir kærleikans, sum gjøgnum frumsøgnina fær ævigt og endurtakandi gildi.

*Personliga angelägenheter* (1996) tvinnar tvær heitar kærleikssøgur saman. Anna C skrivar upp kenslur sínar fyri einum fráverandi og svikaligum elskara. Um somu tíð finnur hon í brøvum, sum liggja eftir pápan, eitt fløkt kærleikslív til eina kvinnu, Ceciliu. Óttin hjá pápanum fyri kærleikanum og kvinnuni verður nýttur at lýsa teir trupulleikar, sum eru í kærleikssambandinum hjá Annu C, og í pappírum pápans finnur hon lykilin til sítt egna kærleikslív. Skaldsøgan viðger sum heild ótta mansins fyri kenslum og styrki kvinnunnar, og hon lýsir ta kvøl, sum hesin ótti veldur kvinnuni.

Í bókunum *Sofias egen bok* (1982) og *Sofia vuxen med sitt MBD* (1998) hevur Märta Tikkanen viðgjørt støðuna hjá dóttrini, sum er fødd við MBD. Við hesum bókum roynir Märta at vísa á støðuna hjá teimum, sum hava hetta brek, og hon heitir á samfelagið í síni heild um at vísa størri fatan.



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

# Kærleikssøga aldarinnar

Sjeytiárini, tá ið Märta Tikkanen steig fram sum rithøvundur, var ein tíð, tá ið kvinnurørsla einaferð aftur tók seg fram sum ein sterk bylgja í Vesturheiminum. Hon setti fram endurnýggjað krøv um fíggjarligt, politiskt og persónligt frælsi hjá kvinnum. Saman við kravinum um persónligt frælsi hoyrdu nýggjar hugsjónir um samlívið millum kynini, í familjuni og millum manna yvirhøvur – at samlívið og samskiftini skuldu vera bygd á javnrættindi. Hetta eru hugsjónirnar hjá teimum *nýggju menniskjunum*, sum eru nevnd í einari yrking:

Och nu kommer du till mej
och vill
att jag ska tala om för dej
vad det är för en verklighet
de pratar om
dehär nya mänskorna

## Formur

Yrkingarnar í *Århundradets kärlekssaga* eru flestallar lagdar í munnin á einum *eg*, sum er kvinna í hjúnabandi. Tað vil siga, at alt er sæð við hennara eygum; hon setur seg ofta í annans stað, men yrkingarnar eru fyrst og fremst hennara uppliving.

Stílurin í yrkingunum er vitborin – intellektuellur. Yrkingarnar eru royndir at lýsa og greina neyvt kenslur og lívsroyndir. Tær byggja als ikki á hevd-



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

bundið skaldamál, har kærleikin er umskrivaður sum ein rósa o.a.tíl. Styrkin liggur tvørturímóti í beinleiðis orðing um hendingar og kenslur. Kenslutyngdin og -hitin eru so undirstrikað við endurtøkum og rútmuni í yrkingunum.

## Evni

Bókin er ein heild við navnleysum yrkingum. Hon er býtt sundur í tríggjar talmerktar bólkar við hvør sínum høvuðsevni:

Í fyrsta bólkinum eru yrkingar um drykkjuskapin hjá manninum. Her eru yrkingar um vónir, vónbrot og beiskleika – og alsamt uppafturkyknandi vónir hjá konuni. Drykkjuskapurin hjá manninum ávirkar bæði hann og hana. Lýst er, hvussu børnini líða undir drykkjuskapinum hjá pápanum, dóttirin, sum er lítil smágenta, og drongurin, sum er stórur smádrongur. Tað er, sum tey liva á einum hóttandi gosfjalli, at tað er mestsum ein lætti, tá ið tørnini hjá manninum eru byrjað, tí tá hevur ræðuleikin sjálvur avloyst ampan.

Í øðrum bólkinum eru yrkingar um sambandið millum mann og kvinnu, sum eru ógvuliga tætt knýtt hvørt at øðrum. Tær lýsa og kanna *kærleikan* og viðgera spurningar sum: Hvussu gongst pørtunum at geva og taka ímóti. Meta báðir partar hvør annan sum tað teir eru – ella royna teir at skapa hvør annan um eftir sínum egna tykki? Hvat merkir *kærleiki* fyri hana? Og hvat merkir *kærleiki* fyri hann?



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Í triðja bólkinum víðkast rúmið rundan um tað talandi *eg* í yrkingunum út um ta trongu kjarnafamiljuna: Formøður hennara, mamma og langomma hennara nærkast henni í huganum og verða henni kærari, sum tíðin líður. Hon vendir sær eisini til *systrarnar*, t.e. aðrar kvinnur í líkari støðu. Her er eisini yrkt um, hvussu kjarnafamiljan forðar persónligum frælsi og skapandi virksemi hjá kvinnum.

Yrkingasavnið tosar ógvuliga beint fram um kenslur millum kvinnu og mann í hjúnabandi: kærleika og hatur, eyðmýking, vón og vónloysi, vónbrot og nýtt treysti. Teir døkku litirnir eru við yvirlutan, og tað so dyggiliga. Spurningurin trokar á: Hví fór ella fer hon ikki frá honum?

Partar av einum svari liggja í yrkingunum sjálvum.

Tað svenska orðið »saga« merkir *ævintýr*, og ævintýr enda væl, vita vit. Vit kunnu fata navnið *Århundradets kärlekssaga* sum spei, tí hon endar ikki væl, sæð uttanífrá. Men vit kunnu spyrja, um hon kortini endar, sum tað kvinnuliga *eg*, sum ber yrkingarnar fram, ómedvitað ynskir, at hon skal enda?

*Århundradets kärlekssaga* rakti fleiri hjartatættir í kvinnurørsluni. Millum teirra eru:

Spurningurin um arbeiðs- og ábyrgdarbýti millum mann og konu í hjúnabandi ella samlívi.

Spurningin um rættin – og tørvin – hjá kvinn-



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

um á persónligari menning og frælsi líka nógv sum hjá manninum.

Spurningin um rættin – og tørvin – hjá kvinnum at vera partur av heildum, eisini uttan fyri familjuna.

Tørvurin á kanningum og kjaki um sálarligar tilgongdir og bygnað, sum sálarfrøðin sigur eyðkenna sálarlívið hjá øðrumegin kvinnum, hinumegin monnum; ikki minst tey lyndiseyðkennini, sum fáa kvinnur at seta sín egna tørv til viks til tess at toknast øðrum.

Tvinni høvuðshugtøk í sálarfrøðini um kvennleika og kallleika eru ávikavist *óvirkni* og *masokisma*, sum kallast kvinnulig eyðkenni, og *virkni* og *sadisma*, sum kallast mannlig eyðkenni. Masokisma merkir einfalt sagt nøktan gjøgnum pínu, sadisma øvugt nøktan gjøgnum at pína onnur. Fyribrigdini eru samantvinnað í sama persóni, men annað er við yvirlutan. Í fyrsta umfari snýr tað seg um kynsliga nøktan, men eyðkennið kann eisini taka yvir onnur øki. Óvirknið hjá kvinnum ger seg eisini í fyrsta umfari galdandi kynsliga í, at kvinnur hava størri tørv á at vera elskaðar enn at elska, men eisini í, at óvirknið er ein ótilvitaður grundhugburður, sum heldur kvinnum frá at orða seg og vera virknar í øllum lívsins viðurskiftum. Freud (1856-1939), sum legði støði undir nútímans sálarfrøði, helt orsøkirnar til, at óvirkni og masokisma vóru so eyðkennandi sum grundhugburður hjá kvinnum, partvíst vera viðføddar og partvíst treytaðar av samfelags-



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

viðurskiftum. Hetta eigur ikki at verða skilt soleiðis, at kvinnar eru óvirknar í lívi og verki, veruleikin uttan um okkum sigur okkum alt annað, men talan er her um sálarligan bygnað. Seinni hava nógvir sálarfrøðingar, ikki minst kvinnuligir sálarfrøðingar, lagt nógv størri áherðslu á mentanararvin og samfelagsligu viðurskiftini sum avgerandi fyri, hvussu kvennleikin og kallleikin verða formað.

Í tekstum Märtu Tikkanens er kvennleikin mótvegis kallleikanum eitt týðandi evni. Viðgerð hennara av kærleikanum og støðu kvinnunnar hevur vakt virðing og undirtøku og hevur gjørt hana kenda víða um í heiminum.

### Skaldskapur eftir Märtu Tikkanen í tíðarrøð

1970: Nu imorron, skaldsøga
1972: Ingenmansland, skaldsøga
1974: Vem bryr sig om Doris Mihajlov, skaldsøga
1975: Män kan inte våldtas, skaldsøga
1976: Århundradets kärlekssaga, yrkingasavn
1979: Våldsam kärlek, sjónleikur
1981: Mörkret som ger glädjen djup, yrkingasavn
1982: Sofias egen bok, sannsøga
1986: Rödluvan, skaldsøga
1989: Storfångaren, yrkingasavn
1992: Arnaia kastad i havet, yrkingasavn
1996: Personliga angelägenheter, skaldsøga
1998: Sofia vuxen med sitt MBD, sannsøga



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

# Kærleikssøga Kaldarinnar

Úrval úr savninum

Einaferð vakti eg teg
mitt á nátt
og bað teg halda um meg
tí eg ikki tordi at
líta á meg sjálva longur

– Legg teg og sov
segði tú og vendi tær
á hina liðina

Eg vakti teg aftur
eg tordi ikki at lata vera

Tú setti teg upp undir teg
hugdi at mær
og hvarv
í tí gráhvíta táminum í góðustovuni

Tú hevði eitt whiskyglas
hálvfult
í hondini
tá tú komst innaftur

– Forbannað
at eg ongantíð kann sleppa at vera veikur
segði tú



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

So tømdi tú glasið
legði teg
og sovnaði

Um leiðina hjá dimminum
til morgun
er onki meira at siga

Um teg og meg
er heldur ikki
so nógv meira at siga



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Miðdepilin í einum lágtrýsti
drúgvur ælingur úr øllum ættum
lágtrýstsskýggini savnast handan fjøll
regnið passar sær løgir

Sum tá eitt tørn byrjar
langir vátir dagar og nætur úr øllum ættum
enn svevur tú, tá tú ert sovnaður

Ongantíð annars er tað so kvirt



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Ein bersøgin lýsing
av alkoholismu
siga teir, sum hava skil fyri mentan

Hvussu ber tað til
at ongin
saknar
til dømis luktirnar?

Tann rami konjakkslukturin
sum gevur tær ein frammaná
í somu løtu tú gloppar dyrnar
Tann vamlisligi deymurin
av konjakki og magasýru
tá tú hevur spýð

Súrt reyðvínsblekk
súrt hvítvínsrop
søtt sjerriskvatl
kleiggjut vermut



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Men tað ringasta er
lukturin av humlu
sum tú stunar út yvir meg
tá tú fyri fimmtúsundu ferð
billar tær inn, at øl økir um máttin, ha!
Tann dravni lukturin sum herskin fer í hvønn krók
í kamarinum
tá tú dettur av í øllum klæðunum
tvørtur um báðar sengurnar
Slevið, sum ølbrúnt rennur niður eftir høkuni
skræpan sum ikki svitast
kennist í húsunum í nógvar dagar
saman við tí beiska landluktinum
sum ein fær so hvítar tenn av

Bara hetta
bara luktirnir



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Sjálvandi veit eg
at til er
ein andstyggilig
áskoðan
um alt:

Nú liggur tú har
so etandi
í klæðunum
um eg ikki lati teg úr
Nú ber til hjá mær
at siga hvat eg vil
og velja mær tað tónalag eg vil
tá eg forði teimum
sum ringja
í at tosa við teg
Nú nervar meg ikki
tín speiska óreinska
sum ger meg frá mær sjálvari
sjálvt um tú ert
órættvísur
tí eg veit
hví tú sigur so –

tú ræðist
meg!



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Nú veitst tú
at skalt tú koma tær
burtur úr hesum
enn einaferð
veldst um
um eg gevi tær
heilivágin
júst tá tú hevur hann fyri neyðini
at eg ikki gevi tær
ein lítlan
júst tá tú heldur
at tú avgjørt ikki
kanst verða hann fyri uttan
at eg síggi til
at tú fært
salt og eggjahvítaevni
tá vætujavnvágin er farin av lagi
at eg fái sjúkrabilin at koma
og ikki lati teg
fáa vilja tín
tá tú noktar at leggja teg á børuna
hóast tú júst hevur biðið um
at sleppa á sjúkrahúsið

at eg síðani siti
og haldi hond tíni
júst tá eg avgjørt ikki
havi hug at halda hond tíni
ella síggja teg
tá samanum kemur



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Onkursvegna
kenst tað ógvuliga andstyggiligt
alt samalt –

at hava tikið
valdið
og ikki
smæðast við tað

Andstyggiligt at vita
at vit bæði
vita tað



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Lít á menniskjuni
tú kanst altíð líta á
at tey vilja tær væl
og eru fitt ímóti tær
um tú ert fitt
móti teimum

Eg eri so bangin
eg eri so bangin so um tú visti
hvussu bangin eg eri
so hevði tú heldur ikki
torað at liva

Tær nýtist ikki at vera bangin
trúgv bert menniskjunum
trúgv at tey eru góð
og vilja hvør øðrum væl

Pápi sat við byrsuni
eina heila nátt
hann sat við byrsuni
og segði at hann skuldi skjóta
og lítlibeiggi og eg
máttu sita hjá honum
alla náttina meðan tú vart í býnum
Vit hildu í hondina hvør á øðrum
vit bara skulvu



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

alla náttina
Ikki heldur tá hann sovnaði
við byrsuni í hondini
tordu vit reisa okkum og ringja til tín
tí um
hann hevði vaknað

Tú veitst ikki
hvussu bangin eg eri
Eg eri so bangin at eg ikki veit
um eg tori at liva

Men eg
má tora at trúgva
enn meira
Nú má eg trúgva so nógv
at vit øll
hóast alt
tora at liva



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Einaferð
krógvaði eg fløskurnar
og stoytti kvikliga
slettirnar
í urtapottar ella øskubikør
og út gjøgnum vindeygað
í somu løtu tú hugdi burtur

Nú skíti eg á tað
Jú skjótari tú kulkar í teg
skjótari dettur tú av
og skjótari sleppi eg at halda fram
við tí sum eg heldur vil gera
enn sita og lurta eftir
tínum einarøðum
lesa fyri børnunum
lesa sjálv
ella heilt einfalt sova
fyri meg sjálva

Kortini er ikki neyðugt at
bíða so leingi longur
tí tú verður fullur
av einum fingurbolla
spýrt
og dettur av



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Snilt
tað sparir bæði tíð
og pengar



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Fyrr
vart tú bara óndur og spottandi
tá tú drakst

Nú ert tú
upp aftur óndari og meira spottandi
tá tú ert edrúur

Tað kann hugsast at tær ikki
nýtist at drekka
tá tú kortini
ert óndur

Hóast alt er tað kanska betri
at tú drekkur
av og á
so sovnar tú í hvussu er
at enda



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Børn
orka ikki at bíða
tá tey hava okkurt at siga
tey noyðast at leggja uppí
og sleppa at siga frá
Hjá okkum
mugu børnini bíða til eftir døgurðan
meðan tú sigur frá tínum tonkum
og endavendir øllum, ið tær hevur verið fyri

Børn
orka ikki óvissuna
tey vilja hava eitt svar
sum er rætt, nakað
tey kunnu líta á
Hjá okkum
mugu børnini finna seg í
at tað ikki er møguligt hjá tær at lova nakað
tú mást altíð hava títt frælsi
so tú kanst koma og fara nær og hvagar tú vilt



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Børn
krógva ikki øvundsjúku
tey klípa systkini, taka leikurnar
frá hvør øðrum, slatra
Hjá okkum
mugu børnini tola
at tú skræðir teirra bestu bók
spillir vinir teirra út
og háðar ta sosialismuna tey trúgva uppá

Børn
steðga ikki keglinum
hvussu tú enn sigur teimum
at tann er klókastur sum gevur seg
Hjá okkum
hava børnini tíðliga lært
at víkja undan
tey svara
Hm Jaja ella Vit fáa at síggja
og lata teg halda fram til tú ikki orkar meira

Børn
plaga ikki at verða tey sum
hava ábyrgdina, tá nakað er áfatt
Hjá okkum
krógvaði tann sjey ára gamli
ta hálvtómu reyðvínsfløskuna aftan fyri bakið
fyri politistinum
einaferð tú koyrdi fullur


© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Børn
eiga vanliga ikki at verja
tað eru tey sum skulu verjast
meðan tey eru smá og hjálparleys
Hjá okkum
eru tað børnini sum verja teg og ugga
tá tú hevur marruna
og hevur brúk fyri styrki frá øðrum

Børn
eiga at vaksa hóvliga
inn í vaksnamannaheimin
læra seg at geva og fáa
og kenna ræðslu men vinna á henni
Hjá okkum
var altíð ríkiligt av øllum hesum
og tess størri var teirra eymleiki
fyri tær, tí barninum
sum alt ov tíðliga var litið teimum upp í hendur



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Sum tú ert sterk
kemur fyri
at fólk siga
við meg

Og eg hugsi
um alt sum er hent
– kanska
eri eg sterk

Ja, tað er helst so
Eg eri helst sterk

Sterk fólk lata seg ikki boyggja
Tey slítast upp

og bresta



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

»Í túsundatali av mannligum alkoholikarum
hava eina kvinnu sum verju
millum seg og ótamda drykkiskapin

Kvinnur
hava ikki tann fyrimunin«

Dagens Nyheter 26. juni 1977



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Alkoholikarar av tí betra slagnum
klára seg
í nógv fleiri ár
enn teir lágløntu bumsarnir
og teir háløntu bumsarnir
hava tey framíhjárættindi
at teir sleppa undan, at tað
kemur út í orð
at teir drekka

Tað betra slagið drekkur heima
bíleggur tað teimum nýtist
og fær sær frí so leingi tørnið varir
skrivarar, børn og konur
eru verjugarðar
móti telefonágangi

Tað betra slagið verður
skjútsað
í loyndum í privatbili
hjálpt av trúføstum vinfólki
sum ikki fortala seg
inn á privatsjúkrahús
har fáa teir einastovu við telefon
so altíð ber til at fáa fatur á
konu og skrivarum
og fáa samband við sjálvan yvirlæknan



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

ta tíð á samdøgrinum teir vilja
teir hava ráð at gjalda túsund og seksti krónur
so at teir verða lagdir inn
So fáa teir eina doyvandi sproytu
so teir sova eina viku
verða so fluttir heimaftur í loyndum
við goymslum av sissandi, styrkjandi
og angistdoyvandi
heilivági
So fáa skrivararnir harraboð
so ongin ivi er um, at teir hava tamarhald á støðuni
og bert trongdu til smávegis hvíld

Tá nakrir dagar eru farnir
síggjast teir aftur á gøtuni
nývaskaðir, masseraðir
í slipsi og hosum í sama liti
ílætnir spildurnýggjar
undirbuksur
sum gevur dirvi
at taka tøk
móti líkasæluni sum er í ferð við at
taka seg upp
bæði á arbeiðsplássinum og heima



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Ongin hevur nakrantíð
sligið meg

Tá eg var lítil
brestu tey meg
á fingrarnar og søgdu
Nei!
So nart eg ikki bøkurnar
á bókahillini aftur

Tá eg vaks upp
og vildi sleppa at vera úti
til klokkan trý um næturnar
segði pápi mín
Treisk!
So bjóðaðu tey øllum teimum heim
sum eg vildi hitta
millum klokkan eitt og trý um náttina
tá eg var fimtan
Tá var tað ikki longur so umráðandi
at hitta tey
um náttina



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Tá tú jagstraði meg
við klovanum
eina ferð
fyri nógvum árum síðani
tá tú vart fullur
ræddist eg teg ikki
tí tað var ikki navn mítt
tú ýldi
tá tú hevjaði klovan
og tú sissaðist straks
tá eg tók hond tína
og tosaði við teg
so at tú hoyrdi
at røddin var mín

Ongin hevur nakrantíð sligið meg
og ongantíð var eg
bangin um
at nakar ætlaði
at sláa meg

Til tú slóst meg

Tú hevur alla orsøk
at ræðast
meg



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Ongin
hevur helst byrjað lívið meira ekkaleyst
enn eg

Ongin
hevur helst verið meira vónrík
enn eg

Ongin
hevur helst verið meira alskin
enn eg

Ongin
hevur helst verið meira óumhugsin
enn eg

Ongin, ongin
hevur helst verið
meira hættislig
fyri ein annan
í síni fevnandi fatan
síni sjálvstýnandi fyrigeving

enn eg



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Helst var tað ikki so
at tú fekst hug á mínum
blomstruta bummullarkjóla
tí eg sá so sakleys út
– sum eg eisini var

ella so, at eg fall fyri
tínum hittinorðum
og tínum flogviti
sum rakti meg
tjúgu ár áðrenn øll verðin varð rakt

men soleiðis
at tín tørvur hóskaði saman við mínum
– tørva og tørvast –
og at vit bæði
vóru frá vitinum

Soleiðis var okkara støði
helst
heilt javnt
og tá tað framyvir ikki gekst so væl
so høvdu vit sjálv
skuldina



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Tú spyrt meg
hvat tú hevur at týða fyri meg
og alt í einum kenst tað
trupult
hjá mær at svara

Tú vart longsul mín
eftir at taka og geva
eitt einasta svar til mín tørv
at verða neyðug
Tú vart tann eg vildi
vera saman við
og hava álit á
og ongantíð svíkja
hvat ið so hendi

Tú vart ein avbjóðing so stór
at ikki kundi farast uttan um hana
tú vart ein uppgáva
ið var alt ov trupul
og tí neyðug
og tú vart tann, sum eg vildi
at børn míni skuldu líkjast


© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Tú vart allir møguleikar
og menning og framtíð
tú vart felags stríð
og tann óhugsandi vónin
um broyting

Tú vart bládýpi
og eg var bládýpi
og saman skuldu vit drukna

Men við árunum
hendi okkurt

Nú ert tú tann
eg búgvi saman við



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Tá vit eru í song saman
er ikki neyðugt
at lurta eftir tær
tosa við teg
hyggja at tær

Tá vit eru í song saman
er mítt andlit so nær
tínum andliti
at tú ikki sært meg

So kann eg vera tann eg eri
í hvussu er
tá vit eru í song saman



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Neyvt girðir tú
mítt lív inni
Nær eg fari frá arbeiði
og nær eg komi til hús
og hvat eg havi gjørt
ein tóman hálvan tíma
longur enn teinurin rímiliga
eigur at taka
sjálvt í meldurtíðini?

Uppøstur
tá eg havi rakað mær
undir ørmunum
Fyri hvørjum
raki eg mær tá samanum kemur
undir ørmunum?

Hvat er tað annars
sum noyðir meg
út at arbeiða
og ger tað ringt at nærkast mær
tá tú kanst
føða meg
so tað ber til hjá mær at vera
heima og bíða eftir tær
allan dagin?



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Tað kann væl vera
at tú heldur
at frælsið ikki kann vera
so neyðugt
hjá mær?
Men tað kemst bara av
tínum ómetaliga
kærleika

Hví virðismeti eg ikki
tín kærleika?



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Vit skeldaðust
ein heilan dag

um at eg ongantíð hevði sagt
nakað um at tú átti at hjálpt mær
við børnunum
og húsarhaldinum

um at eg kanska hevði sagt
og hevði sagt og hevði sagt og hevði sagt
men at tú ongantíð lurtaði eftir
ella skilti
ella legði í
at skilja
tað sum eg royndi at siga

um at tú ongantíð royndi at lesa
mítt fimmhundrað síður langa bræv til tín
tá tú vart rýmdur
tí at tú ikki skilti
at har kanska stóð okkurt
sum hevði størri týdning
enn at tú komst aftur
til mín



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

um at tað einasta tú helst
hevði brúk fyri
var kroppur mín
og ikki mær
ikki mínum tonkum
sum tú annars ongantíð sýnist at
hava havt brúk fyri

um at tá tað kortini bara
var kroppurin
so eru tað
for fanin
aðrir kroppar
í verðini

um at tá tað var so
so ger so væl
og far, far, far

Tú vindur upp segl
á tíni gomlu skútu
og stýrir
uppøstur
sum tongul í brimi

Eg høggi greinar
so spønirnar
fúka
eg gálvi
at tær



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Eg hati teg hati teg hati teg
eg síggi fyri mær
hvussu tú forbannar
og avnoktar meg
og mín kropp og mínar tankar
har í briminum

Tá tú kemur afturíaftur
situr tú tigandi á helluni, blinkstrar spotskur:
»Tá eg kortini
bara tvætli
so er tað besta eg kann gera
at halda kjaft«

Gud forbarmi seg
Gudforbarmiseg forbarmiseg

Eg fari inn
og seti døgurðan útá
Eg altíð eg
sjálvandi eg
og døgurðin

Hyggi út av tilvild
beint í tíni
syrgnu eygu



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Eg fari oman á
helluna
Tín býttlingur, sigi eg
tín satans forbannaði
býttlingur
mussi teg á munnin

Reyvarhol, sigur tú
tvørur
mussar meg á munnin
sjeytúsund volt
loypur avstað og syftir
fýra fiskar
úr sjónum
heldur ein fyrilestur
um Van Gogh* og Fanny Churberg**
prátar prátar prátar

Vit práta
práta
práta

Ja harragud
sum vit mugu
elska hvørt annað

* Vincent van Gogh (1853-90). Niðurlendskur listamálari. Ekspressiónistur.

** Fanny Churberg (1845-92). Finskur listamálari. Nýskapandi landslagsmálari.



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Vanvirðir kvinnur, tú?
Ongantíð í lívinum
hevur tú hoyrt nakað
so vitleyst

Tú sum altíð
bara hevur virt
øll konufólk
tú hevur havt
ja, havt við at gera

Vanvirt tey
hevur tú avgjørt ikki
heldur ikki horurnar
hevur tú vanvirt
sigur tú
errin

Heldur
ikki
horurnar

also



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Tað eru ikki tey stóru svikini
sum drepa kærleikan
kærleiki doyr
av heilt smáum og næstan ósjónligum
svikum

Tá tú í øll hesi ár
uttan at leggja tað til merkis
letur meg einsamalla bera
ábyrgdina og draslið
hevur kærleikin trupult
at liva

Møguleikarnir eru
sum vant
bara tveir

At vekja teg og rista teg
og píska teg og noyða teg
at síggja
og halda fram at elska teg

ella lata
kærleikan
doyggja



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Allastaðni
leitaði eg eftir tær
sum varst allastaðni
í míni tilveru

Eg royndi at broyta
mína tilveru
fyri at tekkjast tær
leitaði eftir tær allastaðni

men at enda fann eg
meg sjálva



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Eg sat hjá mammu
og helt í hondina á henni
tá ljósabláu eygu hennara slóknaðu

Í teirri løtuni lovaði eg henni
at eg ongantíð
skuldi siga sum hon:
Eg havi einki fingið

Tað eg skal siga
um tað gerst neyðugt, er:
Eg havi onki gjørt



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Nú er dagurin komin
hjá okkum at beina fyri
okkara ringu samvitsku systrar

samfelagið alt
livir
av okkara ringu samvitsku

tað er ikki neyðugt
at hava stríð av
at kúga okkum
so leingi tað liggur so væl fyri
at kúga okkum sjálvar

Nú er nóg mikið

Nú er dagurin komin
at beina fyri
okkara ringu samvitsku systrar

Nú ræður um
hjá okkum
at loyva okkum



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

harmin
vreiðina
øðina
hatrið

Tá vit eru lidnar at hata
reisast vit
og fara



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

# Kærleikssøga aldarinnar

Yrkingar úr sjónbandsfilminum

Eg elski teg so ómetaliga nógv
segði tú

ongin hevur nakrantíð elskað so nógv sum eg
eg havi bygt eina pýramidu av berum kærleika
segði tú

Eg havi sett teg á eina súlu, ið
røkkur upp um skýggini

Hetta er kærleikssøga aldarinnar
segði tú

(partur av yrking)



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Kona ein brennivínsmann
er ein
sum altíð fær alt ímóti sær
hvat hon so enn ger

Um hon skilir og skilir
og fyrigevur
og slættar sjógvin
og heldur familjuni burtur
og fær børnini at verða friðarlig
og rósar
og troystar
og trýr og trýr og trýr
og vónar

So hevur hon heilagar lótir
og er altíð so forbannað fullkomin
ein almáttug
sum heldur hon kann flyta fjøll
og koma við syndanna fyrigeving
tað er pínadoyð
so at tú fært vaml
tá tú sært hennara sjálvlýsandi skort



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Og um hon bønar og biður
og goymir fløskurnar
og hellir restirnar út gjøgnum vindeygað
og í urtapottarnar
og noktar at lúgva fyri familjuni
og noktar at tosa um magakrím enn einaferð
við starvsfelagarnar
og vendir tað deyva oyrað til
ta hundrað og seytjandu útgávuna
av teim eydnuleysu barndómsárunum
og tað ógloymandi kríggið
og teir øvundsjúku starvsfelagarnar

So er hon lúnsk og hevnisøkin
og tí vandamikil
og tað er óivað hon
sum at enda
byrjar
allar samansvørjingarnar allastaðni
og baktalingina og útspillanina
tað er sjálvandi hon
sum stendur aftanfyri alt
hvør kennir annars so væl
allar smálutirnar tú fært slongdar
í gronina
Hon situr sum eiturkoppurin í netinum
og bólgnar upp av óndskapi, tí for fjandan…



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Og tá hon at enda fær eyguni upp fyri
at hon hevur sítt egna lív at liva
og at hon kortini ongantíð
kann liva lívið
ella bera byrðarnar hjá einum øðrum
sjálvt um hon so fegin vildi tað

Og so er hon ein harður devul
ein satans strembari
sum átekur sær alt møguligt
fyri øll møgulig
uttan tann sum er henni næst
og hevur mest brúk fyri henni
og sum hon harafturat hevur lovað
at elska í viðgangi og mótgangi
nú var so sanniliga liðugt við tí viðganginum
so knapt talan er um eitt sindur av mótgangi
nú flýgur og fer hon
og er uppi í øllum týdningarleysum
bert fyri sína egnu skyld
og framgongd
skil tað hvør ið vil, lortur í hana
Men minnist til, at tað er ein annar
sum noyðist at gjalda
men tað leggur hon onki í
tann forbannaða kelling



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Og um hon at enda gevur skarvin yvir
og stendur einsamøll
við teimum ringu nervunum
og nervunum hjá børnunum
og samvitskubiti
tí at hon ikki elskaði nóg nógv
ella kanska elskaði ov nógv
tí hon gjørdi tað
og ikki tað
sum kanska kundi havt bjargað øllum
um hon hevði verið meira menniskjanslig
og dugað at skilt

So kanst tú banna uppá
at hon skjótt finnur
ein annan mann
hon kann seta klórnar í
og pína og plága
og stríðast við
og spæla verndareingil fyri
so tað ikki er annar møguleiki
fyri tann stakkalin
enn fløskan…



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Hvussu hart skal eg rópa
hvussu orðaleyst anda tær í oyrað
so at tú skalt fata
hvat eg royni at siga tær –

Hvussu týðiliga skal eg tosa
so at tú kanst fata –

Tað hevur skund nú
um lív skal verða okkum lagað

(partur av yrking)

Hon krýpur upp í føvningin á mær
angandi av svøvni
bleytt dún í nakkanum
orðini detta um hvørt annað:

Veitst tú hvat
eg droymdi so løgið í nátt
eg droymdi at eg drakk í eina heila viku
og eg drakk og drakk
og bleiv púrasta í ørviti
men so fór eg til doktaran



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

og doktarin tók eina blóðroynd
og so fór eg heim aftur
og so drakk eg aftur eina viku
og so bleiv eg aftur í ørviti

Veitst tú hvat
so føldi eg knappliga
at eg var blivin ein vargur
eg var óð og vill og galin
og vildi bara berjast
men so kom vargapápin ímóti mær
og vit beistaðust í bønum
og bitu hvønnannan
men so beit eg hann so hann doyði
og so gavst eg bara at berjast

Við døgurðaborðið
fortelur hon dreymin aftur
fyri øllum
heilt fram til vargapápan
tá kvettir hon av
flennir og sendir mær nøkur eygu

So var ikki meira sigur hon
og heldur fram at súpa
síni gullkorn



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Tú fortelur um, hvussu tú sovnaði
á trappusteininum
mangar nætur saman við hundi tínum
hvussu tú súkklaði og græt
tá hundurin doyði
at tað var svárari at missa
hundin
enn mammu og pápa tín
sum kortini ongantíð vóru edrú ella við hús
og sum ikki vistu
hví tey høvdu teg

Tað er harmiligt
og tú grætur

Eg siti á stólinum yvir av tær
og eg fái tíð at hugsa um mangt
tí søgan er long
og tað er ikki fyrstu ferð
eg fái hana at hoyra

Tú fortelur
og eg undrist á
hví tú onki sigur um tey kvøldini
tá tíni børn
ikki tora at leggja seg at sova
men sníkja seg íkring



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

og hava eyguni eftir tær
Er pápi farin at drekka aftur?
Luktar av konjakki?
Nei, hann fer helst ikki at drekka, helst ikki
helst ikki í nátt

Meðan grætur tú teg í svøvn
tí tað er so synd í tær
ið hevði ein pápa, ið var
alkoholikari

eg siti og hugsi um
nær hatur mítt
fer at brenna teg til
hvíta øsku

Meðan liggur tú og higstrar
uttan at hugsa um
at tíni børn eisini hava
ein pápa

Sum snarljós*
lyftir tú hondina
ið skal sláa meg

* í svenska tekstinum verður sagt seinferð (slow-motion)



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Tað fer nógv
gjøgnum heila mín
áðrenn hond tín
nemur meg

Tankin um allar kvinnur
sum allar tíðir
hava kent hetta bilið
bilið áðrenn hondin slær

Ræðslan sum ger meg
hjálparleysa
so eg ikki megni
at ríva meg leysa
bíta, sparka, flýggja
eg fái ikki latið munnin upp
eg rópi ikki

Kortini
er tað trupult at fata
ómøguligt
at gloyma

(partur úr yrkingini)

Tíðliga
duldi eg mítt viðkvæmi
fyri tær



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Hvussu skuldi eg kunna
gera tær so illa fortreð
at eg læt teg skilja
hvussu nógv fortreð
tú hevur gjørt mær

Tíggju ára gamal
ruddar og vaskar hann
hvønn millimetur nágreiniliga
setur plastikksoldátarnar upp á pláss
soleiðis, at allir byrsumúlarnir peika sama veg
móti einum felags fígginda
sum skal haldast niðri

Hann teknar bara skepilsir
óhugnalig ódjór
við stórum klóm og ránstonnum
og veldugum gapi
sum trínur fram úr myndini
og legst á
alt og øll
tey eru ræðulig og øtilig
og rópa hart av egnari ræðslu

Um kvøldarnar torir hann ikki at leggja seg
tí hann má verða til reiðar



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

um tað verður munnhøggarí
so at vit ikki hugsa um hvat
vit deilast um
men at vit heldur ilskast inn á hann
tí tá eru vit í hvussu er
samd
eina løtu

Um náttina sníkir hann seg upp
at vissa seg um at hvørgin okkara er fluttur
ella horvin
hann nemur við okkum
vissar seg um
at vit liggja har bæði
og sova lið um lið í songini

Hann óttast altíð
hann óttast altíð vanlukkuna
sum hann veit kemur
hann veit bara ikki nær
hann ræðist
at fara framvið einum opnum vindeyga
og tvørtur um túnið
hann torir ikki longur at fara í skúla
nú torir hann skjótt ikki longur at liva

Tann dagin vanlukkan hendir
er tað hann, ið er mest avgjørdur
og hevur mest tol
í tímavís liggur hann undir liðini í songini



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

og kínir hárið av pannuni
og lurtar og prátar
og uggar
heldur um og kroystir
er til staðar
og møðist ikki

Nú er ikki neyðugt
hjá mær at órógvast
nú er tað hent
sigur hann

Hann veksur
fírati sentimetrar
verður herðabreiðari
fyri hvønn dag
Skjótt hevur hann
kreftirnar til ta
ábyrgd sum hann longu
hevur havt so leingi

Í byrjanini kennist tað gott
heilt ørandi og ótrúligt
at tað hóast alt er onkur, ið sær
inn um skræðuna
sum veit
og skilur



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Men aftaná verður alt
bara verri og verri

Síðan kemur spurningurin:
Hví fert tú ikki?

Óteljandi ferðir havi eg
verið á veg

Um hetta ikki verður tað
seinasta tørnið
so fari eg

Um óreinskapurin rakar børnini
so fari eg

Og fer hann harafturat
at lúgva
so fari eg

Og leggur hann nakrantíð
hond á meg
so fari eg

Tá børnini ikki orka meira
tá má eg fara

Alt hetta hendi
og kortini fór eg ikki

Hví?



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

Eg elski teg so ómetaliga nógv
segði tú

ongin hevur nakrantíð elskað so nógv sum eg
eg havi bygt eina pýramidu av berum kærleika
segði tú

Eg havi sett teg á eina súlu, ið
røkkur upp um skýggini

Hetta er kærleikssøga aldarinnar
segði tú

Tað fall mær tungt at sova
tær sjeyhundrað og tíríati fyrstu næturnar
eftir at eg fekk greiðu á
hvussu ómetaliga nógv tú elskar
tín kærleika

(partar úr yrkingini)



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

# Kærleikssøga aldarinnar

Filmurin og yrkingarnar
– evni at arbeiða við

© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

# Evni at arbeiða við

Hyggið at og lurtið eftir filminum sum heild, áðrenn tit fara at kanna einstøk fyribrigdi í honum. Heildin er bæði *formur* og *innihald*, og tey virka saman í upplivanini.

Tá ið vit skulu kanna verkið, er tað hent at býta sundur í *innihald* og *form* til tess at skilja verkið sum *listaverk*, t.e. skilja *hvat*, ið tað sigur, men eisini *hvussu*.

## Formur

Her eru nøkur uppskot til spurningar at seta sær um filmin.

### 1. Hvørjar miðlar brúkar filmurin?

#### Ljóðtátturin

a) Á hvønn hátt eru yrkingarnar bornar fram?

b) Hvønn leiklut hevur tónleikurin?

#### Myndatátturin

a) Hvat er á skíggjanum?

Her er fyrst at geva sær far um, hvørji fyribrigdi yvirhøvur eru víst í filminum. Síggja vit fólk, djór, fremmand lond ella heilt onnur fyribrigdi? Hugleiðið t.d., um tað merkir okkurt serligt, at so nógv er gjørt við eld og vatn – tvey av frumevnunum – í filminum.



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

b) Hvussu verður myndin víst á skíggjanum?

Tað er eisini vert at royna at geva gætur, hvussu fyribrigdini eru víst. T.d. ber til at hyggja eftir, um tey eru mest still ella á ferð, og um tað kann hava serliga merking. Eisini kann vera áhugavert og av týdningi at geva sær far um úr hvørjum sjónarhorni myndin er tikin.

c) Bólkar

Ein liður í nærri greining kann vera at bólka tey týdningarmestu fyribrigdini, so sum tey hóska saman. Tey kunnu verða bólkað eftir ymiskum sjónarhornum – t.d. still ting fyri seg, ting á ferð fyri seg og náttúrufyribrigdi fyri seg.

d) Raðfylgja

Kannið raðfylgjuna ella gongdina í filminum. Skapar raðfylgjan, sum fyribrigdini koma í, eitt skifti úr einari støðu í aðra? Við øðrum orðum: fer nøkur menning fram?

ð) Uppafturtøka

Eru onkur fyribrigdi tikin uppaftur eina ferð ella kanska nógvar ferðir, kanska sum eitt stev? Um so er, hvønn leiklut hava uppafturtøkurnar í filminum?

## 2. Hvussu samsvara filmur og yrkingar?

Lesið yrkingarnar væl.

Kannið yrking fyri yrking, hvussu orð og mynd hóska saman.



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

## 3. Myndamál

Í bókmentagreining og aðrari listagreining merkir myndamál teir hættir, sum listin brúkar til at lýsa eitt fyribrigdi við at bera tað saman við eitt annað fyribrigdi, sum tað líkist ella onkursvegna er skylt við. Talan kann vera um ytri líkskap. Og talan kann vera um innari líkskap ella høpi.

Í bókmentagreining verður skilt ímillum hesi sløg av myndamáli: *súmbol, myndburður (metaforur)* og *samanbering*.

Súmbol eru á ávísan hátt tekin fyri ávís ting ella fyribrigdi. Dømi: krossur er súmbol fyri kristindóm. Sterkt samband er millum súmbolið og tað, sum súmbolið umboðar. Súmbolið vísir á og kastar ljós á tað, sum tað umboðar. Sambandið byggir ikki á ytri líkskap, men á innari høpi. Vit skilja krossin, sum er høvuðssúmbolið í kristindóminum, og t.d. súmbolið hjá Amnesty International, tí tey hava røtur í okkara felags mentanararvi. Nógv súmbol fáa styrki sína úr teimum djúpu og víðfevndu rótum, tey hava í mentanini. Tey samanfata og miðsavna fløktar fatanar- og kensluheildir (dømi: krossurin, sum samanfatar líðing og frelsu). Tað »liggur so nógv í« teimum, merking teirra gerst ikki endaliga upp. Ikki minst *tað* er virði teirra í listini.

Myndburðurin byggir á okkurt slag av líkskapi, andligum ella ítøkiligum. T.d. er fuglur av skiljandi orsøkum vanligur myndburður fyri frælsi. Ein gamal og greiður myndburður fyri haldgóðsku og trúskap er kletturin, her kunnu vit hugsa um Pætur, ið merkir klettur.

Blomstur, djór og mangt annað eru vanligir mynd-



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

burðir og ganga aftur í listini. Men minst líka spennandi er tað, at tað einstaka listafólkið og tað einstaka listaverkið hava sínar egnu myndburðir.

Samanberingar, tað at okkurt er sagt at vera »eins og« ella »sum« okkurt annað, bólkast eisini undir skaldsligum myndamáli. Í samanberingum er sambandið millum teir báðar liðirnar – tað sum er lýst, og tað, sum tað er samanborið við – ikki eins sterkt og í súmbolinum og í myndburðinum; berið saman t.d. »hann var sum ein klettur í lívi teirra«, og »hann var kletturin í lívi teirra«.

Sjálvandi eru samanberingar bara í málinum og ikki t.d. í myndalistini. Samanberingar eru sera vanligar í dagligum máli eins og í skaldskapi. Tó ikki í øllum skaldskapi.

## a) Myndamál í filminum

Er myndamál í omanfyri greindu merking í filminum?

Er tað alment, kent myndamál, ella skapar filmurin sítt egna myndamál?

Markið millum súmbol og myndburð er ikki altíð greitt. Ber til at skilja ímillum í filminum?

## b) Myndamál í yrkingunum

Lesið yrkingarnar og kannið, um súmbol, myndburðir og samanberingar eru í yrkingunum.

## c) Samanspæl millum myndamál í filminum og yrkingunum

Kannið, hvussu myndamálið í filminum og yrkingarnar hanga saman.



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

## Innihald

Í formviðgerðini er sjálvandi nógv komið fram um innihaldið eisini. Her er ætlanin at fáast við innihaldið, temað og boðskapin í filminum – við viðførinum frá formviðgerðini í huga.

### Evni at arbeiða við:

1) Fólk halda sítt um konu ein brennivínsmann, men hvør er veruleikin?
2) Atburðurin hjá børnunum er merktur av, at pápin drekkur. Gentan, sum er tann yngra, hevur sín mótleik. Drongurin, sum er tann eldri, hevur sín máta. Hvussu er atburðurin hjá børnunum?
3) Hví fer hon ikki? Hvat sigur filmurin um tað?
4) Lýsið hvørja mynd vit fáa av kærleikanum.
5) Hvussu er maðurin lýstur?
6) Kvinnan er tann einasta, sum vit bæði síggja og hoyra. Hvussu er hon lýst?
7) Lýsið samskiftið millum persónarnar, serliga mannin og konuna.



© Føroya Skúlabókagrunnur 2006

© Føroya Skúlabókagrunnur 2006